# Blinda liðið

HØGNI HOYDAL



Sjálvt fremstu forsprákararnir fyri neo-liberalu oyðingarhugsjónini, hava nú alment viðgingið ábyrgdina ella hava fjalt seg fyri almenninginum.

George Bush, Sarkozy, Alan Greenspan og Thatcher-viðhaldsfólk noyðast at viðganga, at skattalættarpolitikkurin, útsølan av almennum virðum, framíhjárættindini til tey allarríkastu og eggjan til spekulasjón, hevur gjørt øll fátækari og hevur blakað heimin út í ringastu kreppu síðani 1930-árini.

Eitt statsautoriserað pokerspæl hevur verið spælt kring allan heim. Nú skulu tapini gerast upp og leggjast til onnur at gjalda. Vinningurin skuldi partú einskiljast meðan dansurin gekk. Tapini skulu partú tjóðartakast, nú ballið er búið.

Stjórnir kring allan heim sita dagliga og royna at greina støðuna og finna bót fyri ringastu avleiðingunum. Og fólk krevja ábyrgd og avleiðingar.

**Eitt landsstýri við ongum**

Allastaðni – uttan í Føroyum. Her situr eitt landsstýri, ið als ikki tykist hava ansað, at ábyrgd má akslast. At tørvur er á tilbúgving, umhugsni, ábyrgd, hugsjónarligum víðskygni og politiskum ætlanum, ið kunnu brynja okkum til ein nýggjan og nógv broyttan heim, har vinna og nýggir framleiðsluhættir fara at byggja á nýggja orku og umhvørviskrøv. Og har trúgvin uppá ævigan vøkstur við spekulasjón eftir skjótum profitti, má gerast ein farin tíð.

Einastu boð landsstýrisins eru at kasta enn meiri ábyrgd frá sær – til Danmarkar. Roynt verður at billa fólki í Føroyum inn, at tey verða bjargað av donskum bankapakkum, hóast vanligi borgarin og bankakundin sjálvur rindar fyri loysnir, ið vit nú als onki ræði hava á ella innlit í.

Og í øllum málum av týdningi, vísir landsstýrið bert undirbrotligheit og røkir ongin áhugamál vegna Føroyar. Um tað er á fíggjarmarknaðinum, í fiskiveiðisamráðingum, útbjóðing av almennum arbeiði – ella tað tá skorið verður niður á Fróðskaparsetrinum og á Vinnuháskúlanum.

Her eru bert lítlir áhugabólkar í samgonguni, sum skava til sín, meðan málini fyri tjóðina verða slept eitt fyri og annað eftir.

Spurningurin er, hví vit yvirhøvur hava eitt landsstýri í løtuni. Tá tað antin er formaðurin í einari fíggjarnevnd ella danska stjórnin, ið kortini gera av, tykist landsstýrið bert at verða eitt dýrkandi millumlið fyri avgerðirnar hjá øðrum.

**Pauli Ellefsen uppaftur risin**

Sambands- og afturhaldspolitikkurin er so gjøgnumførdur í løtuni, at sjálvt Pauli Ellefsen hevur kent seg kallaðan at traðka fram aftur og yvirbjóða, nú fólkaflokkurin er vorðin meira sambandskur enn sambandsflokkurin í amtstíðini.

Pauli Ellefsen greiðir Føroya fólki frá, at onki, sum er skapt í Føroyum, er skapt av føroyingum. Nei, allir føroyingar skulu ganga vinarliga og lúta við høvdunum, tí vit duga onki og hava ongantíð dugað tað. Danmark bjargar okkum nú eins og teir sambært Paula eisini gjørdu, tá vit keyptu ein skuldarfongdan banka frá Den Danske Bank og skattgjaldarin arvaði eina risarokning.

Pauli heldur, at tíðin er so langt fráliðin, at hann lættliga kann søgufalsa. Fá minnast, at hann sum løgmaður tvífaldaði uttanlandsskuldina og studningin til fiskivinnuna og setti gongd á verkætlanir, sum kostaðu landskassanum og vanligum smáíleggjarum hundraðtals milliónir í tapi.

Pauli man eisini halda, at tíðin er so langt fráliðin, at hann kann geva sjónvarpinum skyldina fyri at hava lýst bankamálið frá hálvfemsunum skeivt. Hann hevur helst gloymt, at ein frágreiðing varð gjørd av óheftu "Grønborg-nevndini", sum váttaði hvørt einasta orð í sendingum sjónvarpsins um bankamálið. Um Pauli kann ávísa og prógva ein einasta skeivan upplýsing í bankasendingunum, skal hann fáa eina virðislón.

**Uttanríkisráðharrin koblaður úr heiminum**

Ímeðan tosar uttanríkisráðharrin og formaðurin í Fólkaflokkinum framvegis um skattalættar og búskaparvøkstur. Hann roynir framvegis at billa fólki inn, at politikkurin hjá honum og George Bush hevur skapt vøkstur og sterkan búskap. Og hann fírir framvegis ikki fyri at bera skeiv tøl fram fyri almenningin um ábyrgdarleysa skattapolitikkin undanfarnu árini.

Men tølini í tjóðarbúskapunum í USA og Føroyum tala sítt týðiliga mál. Risaundirskot hjá tí almenna og eitt vinnulív, sum er fíggjarliga kollrent í spekulasjón við óveruligum virðum.

Tað tykir mær løgið, at ein uttanríkisráðharri ikki hevur fingið við, hvat hendir í heiminum, og at Bush er farin frá.

**Komið er at mørkum**

Okkum tørvar at fremja veruligar politiskar ætlanir og átøk í Føroyum. Tjóðveldi hevur lagt síni greiðu boð fram og fer fyri framhaldandi at gera tað.

Men landsstýrisflokkarnir mugu vakna nú. Stundir eru ikki til tað atgerðarloysi og tann sambandspolitikk, ið nú ræður. Tað tekur bert sjálvsvirðingina og áræðið frá okkum.

Okkum tørvar eina nýggja ábyrgdarrørslu í Føroyum, um vit ikki skulu gerast sum tað blinda liðið.

# Tí misskilja Kári Bæk og Atli K. Petersen meg

PETUR JACOBSEN
Vinaliga f. R2 Net Spf.



Eg læs fyri stuttum á www.123.fo um eina gransking sum vísir, at tað eru góðar orsøkir til, at unglingar ikki altíð skilja sjónarmiðini hjá teimum vaksnu: Heilin hjá teimum er nevnliga ikki liðugt útviklaður.

Tað stendur onki um aldursmark, so helst koma omanfyri nevndu í handan bólkin, teir misskilja púrasta, hvat eg skrivi um, og tí mugu vit helst bíða nakað enn, til heilin hjá teimum er útviklaður.

Til øll hini - liðugt útviklaðu - sum møguliga hava áhuga í Koda mótvegis føroyskari tónleika-mentan, skal eg kortini koma við nøkrum viðmerkingum.

**Dømi 1. Ein føroysk rás**

Skulu vit hava eina føroyska sjónvarpsrás, sum sendir til 100 húsarhald og ein tíma tónleik um dagin t.v.s. 7 tímar av føroyskum tónleiki um vikuna, krevur Koda at vit gjalda teimum kr.18,43 um minuttin, tað vil siga kr.1.105,80 (Eitt túsund eitt hundrað og fimm krónur og áttati oyru) um tíman, tað er kr. 7.740,60 (sjey túsund sjey hundrað og fjøruti krónur og seksti oyru) um vikuna og um árið verður tað kr. 402.511,20 (fýra hundrað og tvey túsund fimm hundrað og ellivu krónur og tjúgu oyru)

**Dømi 2. Ein útlendsk rás**

Senda vit eina útlendska rás til 100 húsarhald, sum sendir tónleik fleiri tímar um døgnið, skulu vit gjalda 2 krónur pr. húsarhald um árið, tað vil siga kr. 200,- um árið.

**Samandráttur**

Fyri at senda 1 tíma føroyskan tónleik um dagin til 100 húsarhald: kr. 402.511,20 um árið

Fyri at senda fleiri tímar útlendskan tónleik um dagin til 100 húsarhald: kr. 200,00 um árið

Ein munur upp á kr. 402.311,20 - sjálvt ikki SVF hevur ráð til slíkar prísir.

Skuldi tað hent, at vit høvdu ráð til hetta, so kom í mesta lagi 20% kr. 80.000,- aftur til Føroyar. Restin kr. 320.000,- hevði verið verandi í umfar í Danmark, sjálvt um vit bert sendu føroyskan tónleik.

Tá Felagið Føroysk Tónaskøld er umboð hjá Koda í Føroyum, so mugu vit sleppa at samráðast við tykkum um gjald fyri brúk av tónleiki, ella hava tit slettis onki at skula hava sagt? Tað fyrikemur mær, sum tit eru í "Quisling" støðu, tæna útlendskum harraboðum og gloyma tað tit eru settir til, at tæna føroysku tóna/tekst smiðunum. Ein mill. krónur um árið, sum við tykkara vælsignilsi verður forerað vekk av pengunum hjá føroysku tónaskøldunum, er nógv at svara fyri tá, ella um, føroysku tónasmiðirnir fara at vakna.

Til seinast vil eg heita á tykkum, um at lesa tað, sum vit hava ført fram, og svara upp á tað, ikki bert koma við forsvartalum fyri Koda, Koda er ikki gott fyri nakran í Føroyum - ella heilt fá - teir hava ongar reglur, sum eru fyri Føroyar burturav, stutt sagt, har er onki skil í, tað kann eg prógva.

Hvat við at Felagið Føroysk Tónaskøld skipaði fyri einum pallborðs fundi í t. d. Miðlahúsinum um hetta evni í breiðari merking, tað hevði gagnað fjøldini! Eg kundi eisini skipað so fyri, at fundurin - ókeypis - varð sjónvarpaður um alt landið, um ynski er um tað, bert ein treyt, tað má ikki syngjast fyri mína rokning, heldur ikki fyrsta ørindi av tjóðsanginum.

P.S. Tit mugu ikki halda, at loftmiðlarnir í Føroyum eru tykkara fíggindar, vit gjalda meginpartin av tykkara gildið, eisini tað sum tit forera vekk.

Eisini vildi eg gjarna fingið avrit av granskoðaðum roknskapi - við notum og undirskjølum - fyri Felagið Føroysk Tónaskøld og Tutl seinastu fimm árini.

Eg kann eisini almennakunngera, hvat hendi, tá eg seinast spurdi um innlit í roknskapin hjá Felagnum Føroysk Tónaskøld um ynskist.

# Hann næstan græt

HEÐIN D. POULSEN



»Tað pínur meg so nógv, at eg berjist fyri at halda tárini aftur, tá eg hoyri at samgongan nú eisini skerjir Vinnuháskúlan.«

Hetta vóru kenslubornu orðini ein eldri maður segði við meg í svimjihøllini nú ein dagin.

Sjómans- og Maskinmeistaraskúlin, sum í mong ár hava givið føroyskum sjómonnum vón og møguleika, um eina betri arbeiðsframtíð, verður nú skerdur.

Í Føroyum hevur sjóvinnan verið álitið í mong ár. Túsundtals føroyingar og mangar eru familjurnar, sum gjøgnum tíðna hava sett sítt álit á sjógvin. Nú tíðirnar versna hevði tað einasta rættað verið, at ment útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum, ikki skert tær. Við at menna útbúgvingarnar, høvdu vit eggja fleiri at nomi sær útbúgving í Føroyum heldur enn uttanlands.

Alt bendir tó á, at tað sum eitur útbúgving, er fíggindin hjá samgonguni. Ein skuldi ikki trúð at málsøkið yvirhøvur, hevði nakað Landsstýrisfólk. Har er einki gott komið frá enn, at klippa snórar og handa blómutyssi, tað dugir hon tó.

Formaðurin í fíggjarnevndini kallar niðrandi tey við útbúgving fyri akademikarnar í Havn, eg spyrji bara, skulu lærarar og næmingar á Vinnuháskúlanum nú eisini í henda sama pottin hjá formanninum í Fíggjarnevndini?

Lærarar sigast upp, útbúgvingar niðurleggjast, færri næmingatal, er hetta visiónin sum skal gera okkum til heimsins besta land í 2015?

Nei, eg kundi ikki annað enn vera samdur við manninum í svimjihøllini.